# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Tað er ikki rætt, at vit konservativu fáa 18 tinglimir á hvørjum vali, tí vit hava nógv fleiri veljarar enn so*

*Poul Schlüter*

# Kanska sami burturflytari



*Madeleine McCann hvarv 3. mai í fjør og er ongantíð funnin aftur*

*Mynd: Polfoto*



*Mari Luz Cortez hvarv níggju mánaðir seinni. Fyri trimum vikum síðani var lík hennara funnið*

*Mynd: Polfoto)*

**Mari Luz Cortez, sum hvarv á somu leið sum Madeleine McCann, er funnin deyð. Kanska veit drápsmaður hennara okkurt um Madeleine**

Tann 3. mai í fjør hvarv tann trý ára gamla Madeleine McCann í Praia da Luz í Portugal. Níggju mánaðir seinni seinni hvarv tann fimm ára gamla Mari Luz Cortez. Fyri trimum vikum síðani varð Mari Luz funnin deyð, og løgreglan hevur tikið ein mann og skuldsett hann fyri at hava beint fyri gentuni.

Tann 52 ára gamli Santiago del Valle Garcia hevur viðgingið, at hann fjaldi líkið av Mari Luz, men hann vil vera við, at hon doyði, tá hon datt oman ígjøgnum einar trappur. Kanningar hjá løgregluni hava hinvegin víst, at gentan bleiv kvald.

Nú vilja foreldrini hjá Madeleine, Gerry og Kate McCann, hava løgregluna at kanna, um samband kann vera millum tær báðar burturflytingarnar. Ein talsmaður fyri hjúnini sigur við blaðið The Sun, at tey bæði málini eru so lík, at tað er umráðandi at fáa staðfest, um nakað samband kann vera teirra millum.

Sambært The Sun tekur tað umleið hálvan annan tíma at koyra ímillum Praia da Luz og tað staðið, har Mari Luz Cortez bleiv burtflutt.

# McCain boðar frá broytingum

**Verður John McCain valdur til amerikanskan forseta í heyst, ætlar hann sær ikki at reka sama uttanríkispolitikk sum undanmaðurin**



*Sum forseti ætlar John McCain sær at reka ein annan uttanríkispolitikk er George W. Bush*

*Mynd: Polfoto*

Sum senatorur hevur John McCain fleiri ferðir víst, at hann kann ganga sínar egnu leiðir, sum minni enn so altíð sampakka við tað, sum hansara republikonsku floksfelagar vilja hava hann at gera.

Nú ger hann tað aftur. Í gjár segði hann, at USA eigur at gevast við at styðja einaræðisstýri kring heimin, tí tá saman um kemur, er tað hesin uttanríkispolitikkurin, sum hevur skapt hóttanina frá víðgongdum, islamskum kreftum. McCain legði ikki fingrarnar ímillum og nevndi generalarnar í Pakistan, kongshúsið í Saudi-arabia, forsetan í Egyptalandi, iranska shahin og Saddam Hussein sum dømi um einaræðisstýri, sum USA hevur havt ov gott samband við upp ígjøgnum tíðina.

Politiksir eygleiðarar siga, at orðini hjá McCain eru ein týðilig ábending um broyting í amerikanska uttanríkispolitikkinum, um republikanararnir vinna forsetavalið í heyst. Hann kom eisini við einari ábending um, at sum forseti fer hann at lurta eftir, hvat tey sameindu hjá USA halda. Tað ber George W. Bush ikki orð fyri at gera.

- Vit mugu lurta eftir sjónarmiðunum hjá okkara demokratisku sameindu og virða vilja teirra. Halda vit, at tað er rætt at taka okkurt stig, eiga vit at royna at sannføra okkara sameindu um tað rætta í tí, men vit mugu eisini læra at lurta eftir teimum og at fylgja teirra ráðum, segði McCain.

## STUTT SAGT

### Obama kunnger inntøkur

Barrack Obama, sum ætlar sær at gerast forsetavalevni hjá amerikonsku demokratunum í heyst, hevur nú kunngjørt síni inntøku- og skattaviðurskiftini seinastu sjey árini. Á heimasíðu hansara ber til at lesa, at Barrack og konan, Michelle, forvunnu smáar tvær milliónir krónur í 2004, men heilar 12 milliónir í 2006, tá Barrack fekk einar 9 milliónir burtur úr bók síni „Dreams From My Father“. Talsmaðurin hjá Barrack Obama, Robert Gibbs, sigur við BBC, at tað er ikki annað enn rímiligt, at Hillary Clinton almannakunnger inntøku- og skattaviðurskiftini hjá sær og manninum, Bill Clinton.

### Stríð um navn

Grikkaland vil ikki góðtaka, at Makedonia kemur upp í NATO undir sínum núverandi navni, tí ein landspartur í Grikkalandi eitur eisini Madedonia. Tað hevur fingið ST-semingsmannin Matthew Nimitz at skjóta upp, at londini semjast um eina neyðloysn, sum sigur, at landið Makedonia skal eita Lýðveldið Makedonia (Skopje), meðan grikski landsparturin varðveitir sítt navn. Spurningurin um makedonskan limaskap kemur fyri á NATO-fundi í næstu viku, og Grikkaland hevur gjørt greitt, at tað fer at nýta sýtingarrættin ímóti makedonskum limaskapi, fær landið ikki annað navn.

### Skatta-rannsókn

Embætisfólk hjá italska skattavaldinum eru komin til Liktinstein at kanna viðurskiftini hjá 388 italskum einstaklingum og tveimum italskum fyritøkum, sum hava pengar í bankum í Liktinstein. Italska skattavaldið hevur illgruna um, at einstaklingarnir og fyritøkurnar hava ikki givið skattavaldinum rættar upplýsingar um síni fíggjarligu viðurskifti. Sagt verður, at fleiri politikarar eru millum teirra, sum verða kannað.